# Faroe Petroleum tvey nýggj leitiloyvi í Bretlandi

**Føroyska oljufelagið, Faroe Petroleum hevur fingið tillutað tvey nýggj leitiloyvi í 25. Bretsku leitiútbjóðingini. Hetta hendir fáar dagar eftir, at felagið søkti um tvey loyvi í 3. føroysku útbjóðingini.**

LEITILOYVI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Meinhard Jacobsen, nevndarlimur í Faroe Petroleum letur inn umsókn til 3. Útbjóðing. Her hittir hann Petur Joensen, stjóra á Jarðfeingi*
*Mynd Jens K Vang*

Føroyska oljufelagið Faroe Petrolum hevur fingið tillutað tvey leitiloyvi á bretska landgrunninum. Hetta er úrslitið av 25. útbjóðingini í bretskum øki. Felagið hevur saman við Hurricane Exploration sum fyristøðufelag fingið lut í einum loyvi vestan fyri Hetland, ið liggur tætt upp at føroyska markinum. Hurricane hevur 70% av loyvinum og Faroe Petrolum 30%. Hitt loyvið er í einum gassøki, og har hevur felagið 20%, meðan GDF Britain hevur 40% og RWE 40%.

Faroe Petroleum er sera virkið á okkara leiðum og í grannalagnum við nógvum leitiloyvum í bæði føroyskum, bretskum og norskum øki. Felagið fer komandi tvey árini at bora ikki færri enn 20 leiti- og metingarbrunnar, fýra av teimum komandi tríggjar mánaðirnar.

Faroe Petroleum er við í næstu boringini á føroyska landgrunninum, har italski oljurisin ENI er fyristøðufelag.

Herfyri lat felagið inn tvær umsóknir í 3. føroysku útbjóðingini. Onnur saman við StatoilHydro, Atlantic Petroleum og Dong og hin einsamallir.



**Hesin fitti Opel Kadett B**
er til til sølu. Er fyrstu ferð skrásettur í august 1973 og er í sera góðum standi. Hevur einans koyrt 54.000 km. Hevur havt tveir eigarar, tann fyrra fyrstu 28 árini. Til sølu fyri 22.000 kr
Ringið 216409

Betri lívstrygging

**Hevur tú hugsað, hvat hendir familjuni, um tú doyrt ?**

Tankin er ræðandi. Tekna eina lívstrygging nú, so hevur tú gjørt títt, um illa vil til.

Við eini lívstrygging tryggjar tú familjuna ella avvarðandi fíggjarliga, um tú doyrt. Set lívstryggingina saman, so hon hóskar til støðuna hjá júst tær og tínum.

Kundi tú hugsað tær eitt prát, ert tú vælkomin at vitja okkum á torginum í SMS.



Vit eru á torginum í SMS
Frá hósdegnum 13. nov. til leygardagin 15. nov.

sansir.fo

Tel 345 700 • www.betri.fo

Betri pensjón